# Rivið

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av vestri, um kvøldið upp í andøvsgul av útnyrðingi. Sólglottar, men eisini okkurt ælið og hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og okkurt ælið, men seinnapartin lot av vestri, turt og sólglottar. Hitin millum 11 og14 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin ælingur. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið týsdagin og Ólavsøkuaftan:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri. Týsdagin sólglottar, men okkurt ælið, Ólavsøkuaftan yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 17 stig.



*Edvard Joensen*

Í túsundir av árum hevur áin havt við sær tilfar av ymsum slagi, sum vatnið so við og við hevur viðgjørt og lagt í legu, sum kortini flytir seg soleiðis av og á, sum tað nú einaferð ber til.

Smáu steinarnir eru vorðnir smærri og smærri og gerast at enda smá sandskorn, sum leggjast fram við vatnsins strendur.

Og her koma fuglarnir at seta seg. Hvíla eftir langa ferð, ella bara finna sær eitt stað at seta seg eina løtu, meðan fjarðarnar verða reinsaðar.

Uttan fyri koma sílini soleiðis hissini uppundan. Gera ein lítlan ring í blonku vatnskorpuna og eru so burtur aftur beinanveg. Skunda sær, áðrenn másafuglarnir á rivinum varnast tey. Tí tað kann vera lívshættisligt at koma tí slagnum ov nær.

Men av og á eru tey kortini ikki nóg ansin. Eitt nú tá sílafiskararnir standa á rivinum við maðki ella makreli, sum eru ógvuliga freistandi bitar at ogna sær. Tá kemur svikið ofta ov seint til sjóndar, og tey eru fokin, áðrenn tey varnast vandan.

Ella tá oddarnir við fleiri flugum koma siglandi fam við landinum. Eisini fupp og svindul. Góðvarin taka tey hesar flugurnar, sum ikki eru rættiligar flugur kortini.

Og rivið veksur og broytir skap. Fer kanska enn í nøkur túsund ár at gera so.

Men vit, sum nú eru á tí, vita ikki, hvør tá verður her.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 13 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 15 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 24 |
| Tromsø | 16 |
| Bergen | 18 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 22 |
| Moskva | 23 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 27 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 30 |
| Paris | 28 |
| Madrid | 32 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 33 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 37 |
| Beijing | -- |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 16 |
| New York | 30 |
| Miami | -- |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 998 hPa. í útsynning úr Føroyum fer spakuliga í landnyrðing og grynnist. Eitt hátrýst, 1023 hPa. í útsynning vestan úr Írlandi stendur mestsum í stað og mennist.




**Í dag:**
Lágtrýstið í landnyrðing úr Íslandi fer norðureftir. Lágtrýstið í útsynning úr íslandi fer eystureftir, suðurum Føroyar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 22/07 kl. 06[00]–23/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 10,9°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 4,4 mm – mált frá 22/07 kl. 06[00]–23/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 59,6 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

14. juli: Mánin longst frá jørðini
17. juli: Tendring
25. juli: Fyrra kvarter
30. juli: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 24. juli | 00.02 | 12.23 | 11.23 | 23.44 | 11.38 | 23.59 | 02.02 | 14.23 | 03.02 | 15.23 | 10.38 | 22.59 | 09.38 | 21.59 | 00.17 | 12.38 | 01.17 | 13.38 | — | 12.08 | 01.02 | 13.23 |
| 25. juli | 00.44 | 13.19 | — | 12.19 | — | 12.34 | 02.44 | 15.19 | 03.44 | 16.19 | 11.34 | — | 10.34 | 23.10 | 00.59 | 13.34 | 01.59 | 14.34 | 00.29 | 13.04 | 01.44 | 14.19 |
| 26. juli | 01.55 | 14.33 | 00.55 | 13.33 | 01.10 | 13.48 | 03.55 | 16.33 | 04.55 | 17.33 | 00.10 | 12.48 | 11.48 | — | 02.10 | 14.48 | 03.10 | 15.48 | 01.40 | 14.18 | 02.55 | 15.33 |
| 27. juli | 03.12 | 15.38 | 02.12 | 14.38 | 02.27 | 14.53 | 05.12 | 17.38 | 06.12 | 18.38 | 01.27 | 13.53 | 00.27 | 12.53 | 03.27 | 15.53 | 04.27 | 16.53 | 02.57 | 15.23 | 04.12 | 16.38 |
| 28. juli | 04.04 | 16.32 | 03.04 | 15.32 | 03.19 | 15.47 | 06.04 | 18.32 | 07.04 | 19.32 | 02.19 | 14.47 | 01.19 | 13.47 | 04.19 | 16.47 | 05.19 | 17.47 | 03.49 | 16.17 | 05.04 | 17.32 |

5 707265 100067 >